


www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 11 - 2012

# Verkstova um Føroyar og Arktis - avbjóðingar og møguleikar

Miðalhitin í arktiska økinum økist tvífalt so skjótt sum miðalhitin í restini av heiminum. Ísurin bráðnar, og øki, sum higartil hava verið fjald av ísi, verða atkomulig. Uttanríkistænastan bjóðar, í samstarvi við Norðurlandahúsið, til alment kjak um framtíð Føroya í Arktiskum høpi týsdagin 20. november kl. 13 15 í Skálanum í Norðurlandahúsinum. Øll eru vælkomin. Føroyar og Arktis Føroya landsstýri hevur sett sær sum mál at gera eina ætlan fyri, hvussu Føroyar best gagnnýta fyrimunirnar av broytingunum, sum henda í arktiska økinum, so sum nýggju farleiðirnar í arktiska økinum. Sum liður í útgreiningini verður skipað fyri almennum kjakfundum og fyrilestrum um tey evni, sum arbeiðið fevnir um. Fyrrapartin 20. november verður skipað fyri verkstovu, har umboð úr bæði privata og almenna geiranum arbeiða við viðkomandi spurningar - Hvussu gagnnýta vit nýggju møguleikarnar? Hvussu umseta vit hesar til bæði ítøkiligan vinning og arbeiðspláss fyri landið? Á hvørjum økjum eru Føroyar mest kappingarførar í mun til tilgongdina í arktiska økinum? Hvørjar tillagingar skulu vit fremja, og hvørjir førleikar skulu mennast? Tiltakið byrjar við einum fyrilestri við Rasmus G. Bertelsen, granskari í altjóða politikki á Arktiska Deplinum á Aalborg Universitet. Síðani fara verkstovurnar í bólkar at arbeiða við ávikavist Sjóvinnu, Oljuvinnu og Tænastuvinnur. Kjakfundur Kl. 13 verður alment orðaskifti. Eftir stuttan fyrilestur verða høvuðsniðurstøður frá fyrrapartinum lagdar fram. Síðani verður orðaskifti, har øll áhuga fáa møguleika at siga sína hugsan um, hvussu vit best gagnnýta nýggju møguleikarnar. Fundarstjóri verður Stefan í Skorini, ráðgevi í Vinnuhúsinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.